# UMSJÓNARFÓLK

Hervið verður søkt eftir umsjónarfólki til dagstovnarnar og eldrasambýlið hjá kommununi.

**Arbeiðsuppgávur**
At hava um hendi dagligu umsitingina av dagstovnunum og eldrasambýlinum.

Umhvørvið uttan um bygningarnar er ein sjálvsagdur partur av arbeiðinum.

**Førleikakrøv**
Vit sóknast eftir einum fyrikomandi fólki, sum dugir at arbeiða sjálvstøðugt, men sum eisini kann átaka sær aðrar arbeiðsuppgávur, enn tær lýstu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og hevur tilvísing til teknisku deild.

Lønar- og setanarviðurskiftini eru við avvarandi yrkisfelag ella eftir avtalu.

Staðið verður sett frá 4. august 2008 at rokna.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna, tlf. 470110.

Umsókn saman við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til Vestmanna Kommunu, Bakkavegur 16, 350 Vestmanna.

Umsóknin skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi 19. mai 2008, kl. 1200.

Vestmanna Kommuna skilar sær rætt til frítt at velja ímillum umsøkjararnar ella ongan at velja.

**Vestmanna Kommuna**



# Bókmentafrøðingur
## til Føroyamálsdeildina

Treytað av játtan á fíggjarlógini fyri 2008 er eitt undirvísingar- og granskingarstarv í bókmentum leyst at søkja á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum. Søkt verður eftir adjunkti, sum skal virka fyri at menna gransking og undirvísing í bókmentum á deildini.

Granskingarparturin verður knýttur at serøki umsøkjarans. Samstarv innan- og uttanseturs er týdningarmikið í starvinum.

Starvið er partur í menningini av Føroyamálsdeildini, so at hon kann taka upp studentar til lestur á hvørjum ári. Útbúgvingarparturin í starvinum fevnir um fakliga samskipan, ábyrgd og undirvísing í bókmentasøgu og greining á støðisnáminum og í bókmentaligum evnum á BA- og MA-útbúgvingunum á deildini.

Adjunktstørv eru útbúgvingarstørv. Tann, sum sett/ur verður í starv sum adjunktur, eigur um fýra ár og í seinasta lagi um fimm ár at kunna lata seg lektarameta.

Umsøkjarar skulu hava kandidat-, cand.mag.- ella MA-prógv í norðurlendskum, bókmentafrøði ella samsvarandi, sum ikki er eldri enn seks ár. Til at skjalprógva vísindaligar førleikar eiga umsøkjarar at senda í minsta lagi eina ritgerð við umsóknini og lýsa undirvísingarroyndir sínar.

Sett verður metingarnevnd at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum. Gjørt verður vart við, at hvør umsøkjari fær sendandi metingina um sínar førleikar.

Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Maluna Marnersdóttur, megindeildarráðsleiðara, á teldupostadressu *malanm@setur.fo.*

Starvið verður sett frá 1. august 2008 ella skjótast gjørligt. Umsóknir í fýra eintøkum við ævilýsing, viðmælum/tilvísingum, útgávulista og avritum av próvskjølum, serprentum og vísindaligum ritgerðum verða sendar til adressuna niðanfyri.

**Umsóknarfreistin er 2. juni 2008.**

Fróðskaparsetur Føroya
Setursskrivstovan · Postsmoga 272 · FO 110 Tórshavn

Føroyamálsdeildin (FMD) á Fróðskaparsetrinum skipar fyri Bachelor of Art- (BA) og Master of Art- (MA) útbúgvingum í føroyskum, sí ***http://setur.fo/fo/foeroyamalsdeild/.*** Í serstøkum førum ber til at taka ph.d.-útbúgving. Á deildini starvast sjey granskarar, ein skrivari og tríggir granskingarhjálparar, umframt uttansetursundirvísarar. Á FMD eru fleiri málfrøðilig søvn, kvæða- og frásagnarsavn, umframt brøv og skjøl eftir granskarar og rithøvundar. Granskararnir á FMD eru við í granskingarverkætlanum í samstarvi við aðrar stovnar og við granskarar innan- og uttanlands.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

SENDISTOVAN

um...
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
...er lisin
-so ert tú við!

**Frá Heilsuhjálparafelag Føroya**

Í samband við, at Ása Olsen, ið hevur verið forkvinna í felagnum tey seinastu 12 árini hevur lagt frá sær og fer í nýtt starv og Ása Holm er nývald sum forkvinna í felagnum, verður almenn móttøka fyri farandi og komandi forkvinnum mikudagin frá kl. 15.00 til 18.00 í hølum felagins Fr. Petersensgøta 7.

**Nevndin**

# TIL SØLU
Nýmótans frisørsalong í Havn til sølu
Áhugað kunnu ringja á tlf. 218 318




SØKT VERÐUR EFTIR

## SJÚKRARØKTARFRØÐINGUM TIL DANSKT UNIVERSITETSSJÚKRAHÚS (Í JYLLANDI)

**Hevði tú hugsað tær...**
at búð í Danmark í eina tíð
at vunnið tær kvalifikatiónir í nýggjum sergreinum
at fingið eina víðari útbúgving
ella...

**So kunnu vit bjóða tær...**
setan á Universitetssjúkrahúsi
Møguleikar fyri at fáa goldnað víðari útbúgving
(ex. Intensiva serútbúgving)
Hjálp til at finna bústað
Løn sambært danskar setanartreytir
Les meira á **www.samheadhunting.dk**

**UPPLÝSINGAR ANNARS FÁAST VIÐ AT VENDA SÆR TIL:**

Lene Bach
SAM Headhunting, Danmark
Telefon 0045 98 42 2000
**lb@samheadhunting.com**

Jógvan við Keldu
SAM Headhunting, Føroyar
Telefon 21 61 36 – 45 79 88
**jvk@samheadhunting.com**